Fleiri rásir - einki roks

# Seabiscuit

**Á Canal+ Film 1 í kvøld kl. 20.00**

Seabiscuit snýr seg um tríggjar menn, ið hava mist alt undir teimum tungu kreppuárunum í 1930unum yviri í USA. Men hóast hetta, so endurvinna teir trúnna aftur uppá framtíðina, tí teir fáa eyga á ein merkverdigan hest við kappríðingarbreytina. Millióningurin Charles Howard fer burturúr tí blómandi bilídnaðinum, eftir at sonur hansara doyr í eini bilvanlukku. Hann fer ístaðin undir rossahald. Ein annar er kovboyarin Tom Smith, hvørs heimur er við at syndrast - hann prátar heldur við hestar enn við menniskju. Og so er tað kappríðarin Red Pollard - ein maður, ið gongur við einum lagnutungum loyndarmáli. Men í miðdeplinum er hesturin Seabiscuit, ið øll eygu til endans eru fest á. Hesturin gjørdist hetjan í einum samfelagi í veruliga hevði brúk fyri einari tílíkari.



*Hetjan í filminum er hesturin Seabiscuit*



*Tríggir mans og ein hestur við kappríðingarbreytina. Amerikanskur dramafilmur frá 2003 við Tobey Maguire, Chris Cooper og Jeff Bridges*

# Pavilion of Women

*Amerikanskt/kinversk romantiskt drama frá 2001*

**Á Kanal 5 sunnukvøldið kl. 22.25**





*Filmurin snýr seg um forbodnan kærleika millum ein amerikumann og eina kinesiska fúrstakonu*

Árið er 1938, og í Kina úlmar ein kommunistisk kollvelting. Samstundis hevur keisararíkið Japan ætlanir um at leggja bæði Manchuria-landspartin og Kina undir seg. Feudali fúrstin Wu stýrir landinum og familju síni við harðari hond. Konan Madame Wu hevur fingið nokk av harðrenda manni sínum. Tá 18 ára gamli sonur hennara Fengmo skal til at giftast metir Madame Wu seg hava gjørt sínar skyldur mótvegis familjuni. Ímóti allari vanligari siðvenju syrgir Wu fyri at unga bóndagentan Chiuming verður nýggja elskarinnan og hjákonan hjá Wu, soleiðis sleppir Madame Wu undan at liggja saman við fúrstanum. Samstundis hittir hon privatlæraran hjá soni sínum. Hann er amerikanskur trúboðari og lækni, nevndur Faðir Andre. Hesin er vinarligur og sera vitugur maður. Madame Wu forelskar seg í hesum gátufulla amerikanska trúboðaranum, ímeðan verður bæði familja hennara og alt Kina drigið út í ruðuleika og kríggj.